# Verkætlan viðv. gerð av nýggjari A-skattaskipan

Sbr. bræv dagf. 9. august 1995 frá P.A.Lamhauge varð ein arbeiðsbólkur settur at gera uppskot til eina nýggja A-skattaskipan, sum varðveitir fyrimunirnar við kumulativu skipanini, og minkar um verandi vansar. Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt útfrá fylgjandi høvuðstreytum:

- a) Skattatrekkið skal vera so javnt sum gjørligt
- b) Samlaði skatturin skal vera so rættur sum gjørligt í mun til endaligu álíkningina.
- c) Gjørligt skal vera altíð at gera eina fullfíggjaði frágreiðing um skattaútrokninga.
- d) Skipan skal vera løtt at umsita og bílig í rakstri

**Niðurstøða**
Arbeiðsbólkurin hevur roynt ymsar roknihættir, sum allir hava tað felags, at teir nýta eitt sokallað rullandi inntøkugrundarlag undir upprokning til ársinntøku.
Bólkurin metir at hava funnið ein roknimáta, sum er væl betri enn verandi skipan, og sum lýkir omanfyrinevndu treytir. Tó má gerast vart við, at roknimátin er nógv meiri torskildur enn í verandi skipan, og tað kann tí gerast trupult, at geva eina frágreiðing, sum flest øll skilja.
Hinvegin verður mett, at útrokningarhátturin vil bøta so nógv um afturhaldsskipanina, at ónøgdin vil minka nógv.

**Tíðarfreistir**
Um nýggja skipanin skal virka frá 01. januar 1995, má endalig støða til uppskotið verða tikin áðrenn 15. november 1995, fyri at kunna gera ta neyðuga arbeiði viðv. programmering og upplýsingartilfarið til skattaborgaran.

**Hjálagt tilfar**
Hjálagt er fylgjandi tilfar:
- Frágreiðing um núverandi status
- Arbeiðið við gerð av nýggjari skipan
- Stiliseraði dømir, sum lýsa munin millum útrokningarhættirnar
- Frágreiðing um nýggja **adaptiva** útrokningarháttin
- Ymisk verulig dømi fyri ymsar inntøkubólkar

Tórshavn, tann 6. november 1995

Arbeiðsbólkurin: Kurt Madsen, Sofus Johannesen, Dorit Reinert, Eyðólvur Gislason, Páll Beder, Elin í Jákupstovu

# Núverandi status

Núverandi A-skattaútrokning grundar seg at eina kumulativa útrokning, sum upproknar inntøku higartil til ársbasis.

**Fyrimunurin** við kumulativu skipanani er m.a., at skipanin sjálv megnar at laga skattaprocentið til flestu broytingar, sum henda í inntøkumynstrinum hjá tí einstaka gjøgnum árið. Eisini megnar skipanin at laga skattaprosentið hjá tí einstaka til broytingar, sum verða gjørdar í skattafortreytunum, so sum skattastiga, Als-prosent, rentufrádráttar-prosent v.m. Samanuntikið merkir hetta, at skipanin er munandi lættari og bíligari at umsita enn t.d. ein skipan við føstum trekkprosenti, samstundis sum endaliga úrslitið uppá ársbasis er munandi rættari.

**Vansin** við kumulativu skipanini hinvegin eru teir stóru svingningarnir, sum vera í trekkprosenti frá ferð til ferð. Hetta merkir, at tann einstaki frammanundan ikki veit, hvussu nógv verður trekt í skatti.

- **Hjá persónum við skiftandi inntøkum** vil skattaprosentið falla (ofta í botn), tá ein lítil inntøka verður útgoldin, og hinvegin fer skattaprocentið upp, tá ein stór inntøka verður útgoldin. Skattaprosentið hjá hesum kann tí í reinu kumulativu skipanini svinga millum 0 og 57% (sum var skattahámarkið í 1994).
- **Hjá persónum við jøvnum inntøkum** verður skattaprocentið sjálvandi meira stabilt, men eisini her kunnu svingningar koma í, t.d. vil ein eykaútgjalding av yvirtíð ella ein forskjóting av vanliga útgjaldstíðspunktinum geva útsving í skattaframrokningina.

**Demparin**
Fyri at avmarka svingningarnar frá ferð til ferð, var fyri nøkrum árum síðani ein dempari lagdur inn í skattaskipanini, sum hevði til endamál at avmarka útsvingið í trekkprosenti til í mesta lagi +/- 5% frá roknaða miðalskattaprosentinum hjá tí einstaka.
Demparin sker sostatt toppin og botnin av svingningunum, men tann grundleggjandi kumulativa útrokningin við upprokning til ársinntøku er óbroytt.

Dømi um skattatrekk hjá persóni við skiftandi stórum og smáum inntøkum, sum vísir munin á kumulativu skipanini við og uttan dempara, har reyðu strikurnar vísa trekk-% uttan dempara og tær grønu við dempara. Í hesum dømi verður samlaða úrslitið í báðum førum rætt í mun til ársskattin, t.v.s. munur = 0
Nógv dømi eru tó um, at demparin ikki megnar at tillaga skattatrekkið til endaliga skattin.



# Uppskot til nýggja A-skattaskipan

<u>Arbeiðsbólkurin hevur nýtt hesar fortreytir:</u>

a) Skattatrekkið skal vera so javnt sum gjørligt
b) Samlaði skatturin skal vera so rættur sum gjørligt í mun til endaliga skattin.
c) Gjørligt skal vera altíð at gera eina fullfíggjaði frágreiðing um skattaútrokninga.
d) Skipanin skal vera løtt at umsita og bílig í rakstri

Grundleggjandi eru tvinnir møguleikar:

- **at nýta eitt fast prosent , ella**
- **at nýta eitt flótandi prosent, sum verður roknað so hvørt inntøkan kemur til útgjaldingar.**

Eitt fast prosent vil lúka krøvini undir a) um javnt skattatrekk og c) um fullfíggjaða frágreiðing um útrokningina. Hinvegin vil samsvarið við endaliga skattin gerast munanadi verri, t.v.s. at árligi avlopsskatturin, sum skal afturrindast verður fleirfaldaður og somuleiðis írestandi skatturin, sum skal innkrevjast árið eftir.

Arbeiðsbólkurin hevur í hesum sambandi ikki gjørt nærri kanningar viðv. føstum prosenti, men vísir til aðra kanning, dagf 18. januar 1994, har hetta evni varð gjølla viðgjørt. Úrslitið av kanningin tá (fyri skattaárið 1993) var, at um tað prosentið, sum verður uppsett áðrenn árið byrjar, hevði verið nýtt, so hevði avlopsskatturin verið 2,2 ferðir størri, og tann írestandi skatturin 2,3 ferðir størri enn við verandi skipan.
Skattaeftirstøðurnar høvdu sostatt vaksið munandi.

Ein skipan við føstum prosenti hevði eisini lagt væl størri arbeiðsbyrðu á umsitingina í samband við skráseting av væntaðum inntøkum og frádráttum hjá tí einstaka, bæði áðrenn ársbyrjan og í samband við broytingar í árinum.

Verandi skipan hinvegin lýkur krøvini undir punkt b) og d), men demparin sum upprunaliga varð gjørdur fyri at lúka treyt a) um at javna skattatrekkið, hevur ikki megna hetta til fulnar.

Arbeiðsbólkurin varð skjótt greiður yvir, at skuldi nakað munagott gerast fyri at javna út skattatrekkið frá ferð til ferð, varð neyðugt at broyta ta kumulativu upprokningina til ársinntøku, soleiðis at upprokningin ikki bara er grundað á inntøku higartil í innverandi ári, men í størri mun lagar seg eftir, hvussu inntøkugongdin hjá tí einstaka er mánað fyri mánað, t.v.s. at upprokningin ein ávísan mun verður ávirkað av, hvussu inntøkan í meðal hevur verið t.d. seinastu tríggjar mánaðirnar.

Nýggja útrokningin við einum rullandi inntøkugrundarlagi tillagar roknaðu ársinntøkuna hesaferð til roknaðu ársinntøkuna seinast. Framroknaða ársinntøkan, sum er grundarlagið undir skattaútrokningini er sostatt eitt vigað meðaltal millum væntaða ársinntøku hesaferð og

seinast. Vektfaktorarnir, sum verða nýttir, eru ikki fastir, men verða individuelt roknaðir hvørja ferð hjá tí einstaka, treytað av hvussu stór inntøkan hesaferð er í mun til samlaða inntøku í alt.

Harumframt er í nýggju skipanini í mun til verandi skipan bygt inn, at skattaborgarin kann fráboða eina varandi broyting í inntøkugongdini, t.d. um viðkomandi varandi fer niður í løn í samband við arbeiðsloysi e. l., og verða fráboðaðu lønartølini nýtt sum grundarlag í útrokningini í 3 mánaðar, tá automatiska skipanin tekur við aftur. Nýggju lønartølini eru tá við rullandi inntøkugrundarlagnum komin inn sum inntøka seinastu 3 mánaðirnar, um samsvar er millum fráboðaðu og veruliga inntøkugongd.

Nýggja útrokningin gevur eitt munandi javnari skattatrekk í mun til inntøkugongd, t.v.s.

- jøvn inntøka :javnt skattatrekk,
- javnt skiftandi inntøka : javnt skiftandi skattatrekk í mun til inntøkuna
- ójavnt skiftandi inntøka: skiftandi skattatrekk í mun til inntøkuna

Samanuntikið vil nýggja útrokningin lúka uppsettu krøvini um skattaútrokninginia.
Tó skal viðmerkjast viðv. punkt c) at tað verður neyðugt at einfaldgera frágreiðingina um sjálva framrokningina av ársinntøku, umframt at tað eisini skal vera gjørligt at skriva alla útrokningina út punkt fyri punkt til tey, sum hava áhuga fyri hesum.

Bólkurin hevur valt at nevna nýggju útrokningina fyri ta ***adaptivu*** (tillagaðu) útrokningina í mun til ***kumulativu*** (uppsummerandi) útrokningina.

Fyri at sammeta nýggja roknimátan við verandi skipan, hevur bólkurin valt at finna fram verulig inntøkudømi hjá fylgjandi inntøkubólkum:

1. Persónar við javnari mánaðarinntøku, við og uttan eykaútgjaldingum
2. Persónur við javnari inntøku, sum fer niður í árinum, t.d vegna arbeiðsloysi
3. Persónur við javnari inntøku, sum fer upp í árinum, t.d. vegna nýtt arbeiði eftir útbúgving
4. Pensiónistur við aðrari inntøku, t.d. kríggspensión
5. Persónar við skiftandi inntøkum, t.d. vikuløntir, langfarafiskimenn, útróðrarmenn v.m.

Á næstu blaðsíðu eru víst fram stiliseraði dømi fyri hvønn av hesum inntøkubólkum, fyri at lýsa munin millum verandi og nýggja skipan. Harumframt eru fleiri verulig dømi fyri hvønn bólk hjáløgd sum fylgiskjøl.

Grønar strikur = verandi skipan
Bláar strikur = nýggj skipan




**Bólkur 1:**
Hetta er dømi um persón við javnari inntøku, har útgjaldsdagurin skiftir nakað frá mánað til mánað. Nýggja skipanin gevur at kalla heilt javnt trekk og endaliga úrslitið er betri.




**Bólkur 2:**
Hetta er dømi um persón við javnari inntøku, sum fellur munandi seinastu 7 mánaðirnar, og sum boðar frá um hetta. Verður ikki fráboðað um inntøkufallið, fellur skattaprosentið javnt og stabiliserast síðani. Endaliga úrslitið er væl betri enn við verandi skipan




**Bólkur 3:**
Hetta er dømi um persón við javnari inntøku, sum veksur munandi seinastu 4 mánaðirnar, og sum boðar frá um hetta. Verður ikki fráboðað um inntøkuvøksturin, veksur skattaprosentið javnt restina av árinum. Endaliga úrslitið er væl betri enn við verandi skipan.




**Bólkur 4:**
Hetta er dømi um pensiónist við aðrari inntøku umframt pensiónina. Nýggja skipanin gevur eitt nógv javnari trekk, og endaliga úrslitið er eins gott og betri.




**Bólkur 5:**
Hetta er dømi um vikuløntan við skiftandi inntøku alt árið. Nýggja skipanin gevur at kalla javnt trekk alt árið, og endaliga úrslitið er betri.

| DAGF: | 01.01.95 | DAGF: | 01.01.95 | DAGF: | 31.12.95 |
|---|---|---|---|---|---|
| INT_FRD: | 0 | SKT_FRD | 0 | VNT_INT | 0 |

| DAGUR<br>BÓLKUR 5 | INNTØKA | NÚVER.<br>DEMPARI | ADAPTIV<br>ÚTROKN. |
|---|---|---|---|
| 1994 | 147267 | | |
| 13.01.95 | 1.810 | 428 | 729 |
| 18.01.95 | 3.143 | 1.279 | 1.260 |
| 26.01.95 | 2.946 | 1.227 | 1.178 |
| 27.01.95 | 1.566 | 689 | 630 |
| 01.02.95 | 2.746 | 1.235 | 1.115 |
| 15.02.95 | 3.906 | 1.425 | 1.574 |
| 23.02.95 | 3.584 | 1.491 | 1.443 |
| 02.03.95 | 4.237 | 1.915 | 1.715 |
| 03.03.95 | 1.558 | 722 | 637 |
| 09.03.95 | 3.708 | 1.748 | 1.539 |
| 15.03.95 | 2.944 | 1.394 | 1.234 |
| 22.03.95 | 253 | 91 | 106 |
| 29.03.95 | 1.387 | 486 | 577 |
| 07.04.95 | 2.186 | 757 | 875 |
| 12.04.95 | 1.882 | 652 | 745 |
| 14.04.95 | 1.531 | 534 | 606 |
| 19.04.95 | 925 | 320 | 366 |
| 26.04.95 | 2.106 | 726 | 826 |
| 27.04.95 | 1.153 | 400 | 453 |
| 03.05.95 | 1.125 | 387 | 442 |
| 10.05.95 | 2.300 | 790 | 903 |
| 11.05.95 | 769 | 265 | 302 |
| 17.05.95 | 931 | 318 | 365 |
| 25.05.95 | 2.683 | 915 | 1.044 |
| 26.05.95 | 988 | 363 | 385 |
| 07.06.95 | 2.721 | 923 | 1.053 |
| 09.06.95 | 1.129 | 451 | 437 |
| 14.06.95 | 2.750 | 1.192 | 1.072 |
| 21.06.95 | 2.851 | 1.159 | 1.116 |
| 28.06.95 | 4.386 | 1.942 | 1.736 |
| 05.07.95 | 3.263 | 1.369 | 1.294 |
| 12.07.95 | 3.212 | 1.343 | 1.277 |
| 09.08.95 | 3.736 | 1.263 | 1.424 |
| 16.08.95 | 3.505 | 1.191 | 1.323 |
| 23.08.95 | 4.044 | 1.532 | 1.541 |
| 30.08.95 | 759 | 258 | 288 |
| 06.09.95 | 1.361 | 460 | 508 |
| 13.09.95 | 2.591 | 877 | 966 |
| 15.09.95 | 1.816 | 765 | 686 |
| 20.09.95 | 3.779 | 1.672 | 1.462 |
| 27.09.95 | 3.772 | 1.673 | 1.488 |
| 29.09.95 | 137 | 47 | 54 |
| 04.10.95 | 2.639 | 1.074 | 1.044 |
| 11.10.95 | 2.282 | 869 | 898 |
| 18.10.95 | 3.794 | 1.640 | 1.508 |
| 25.10.95 | 1.571 | 541 | 619 |
| 27.10.95 | 369 | 127 | 145 |
| 02.11.95 | 2.020 | 720 | 799 |
| 08.11.95 | 1.289 | 442 | 509 |
| 10.11.95 | 1.060 | 419 | 418 |
| 16.11.95 | 1.552 | 539 | 605 |
| 22.11.95 | 3.570 | 1.568 | 1.415 |
| 24.11.95 | 1.202 | 529 | 478 |
| 29.11.95 | 3.366 | 1.501 | 1.383 |
| 07.12.95 | 642 | 221 | 264 |
| 08.12.95 | 222 | 76 | 91 |
| 20.12.95 | 1.510 | 515 | 600 |
| 21.12.95 | 3.006 | 1.032 | 1.169 |
| 28.12.95 | 3.717 | 1.579 | 1.442 |
| 31.12.95 | 3.992 | 1.784 | 1.815 |
| ÍALT 1995 | 135982 | 53850,4 | 53975,8 |
| Rættur skattur | | | 53975,8 |






| DAGF: | 01.01.95 | DAGF: | 01.04.95 | DAGF: | 31.12.95 |
|---|---|---|---|---|---|
| INT_FRD: | 0 | SKT_FRD | 10000 | VNT_INT | 0 |

| DAGUR BÓLKUR 5 | INNTØKA | NÚVER. DEMPARI | ADAPTIV ÚTROKN. |
|---|---|---|---|
| 1994 | 147267 | | |
| 13.01.95 | 1.810 | 428 | 729 |
| 18.01.95 | 3.143 | 1.279 | 1.260 |
| 26.01.95 | 2.946 | 1.227 | 1.178 |
| 27.01.95 | 1.566 | 689 | 630 |
| 01.02.95 | 2.746 | 1.235 | 1.115 |
| 15.02.95 | 3.906 | 1.425 | 1.574 |
| 23.02.95 | 3.584 | 1.491 | 1.443 |
| 02.03.95 | 4.237 | 1.915 | 1.715 |
| 03.03.95 | 1.558 | 722 | 637 |
| 09.03.95 | 3.708 | 1.748 | 1.539 |
| 15.03.95 | 2.944 | 1.394 | 1.234 |
| 22.03.95 | 253 | 91 | 106 |
| 29.03.95 | 1.387 | 486 | 577 |
| 07.04.95 | 2.186 | 596 | 670 |
| 12.04.95 | 1.882 | 513 | 563 |
| 14.04.95 | 1.531 | 423 | 459 |
| 19.04.95 | 925 | 252 | 276 |
| 26.04.95 | 2.106 | 568 | 617 |
| 27.04.95 | 1.153 | 315 | 338 |
| 03.05.95 | 1.125 | 302 | 330 |
| 10.05.95 | 2.300 | 616 | 674 |
| 11.05.95 | 769 | 207 | 226 |
| 17.05.95 | 931 | 246 | 272 |
| 25.05.95 | 2.683 | 708 | 770 |
| 26.05.95 | 988 | 263 | 284 |
| 07.06.95 | 2.721 | 709 | 770 |
| 09.06.95 | 1.129 | 296 | 320 |
| 14.06.95 | 2.750 | 730 | 792 |
| 21.06.95 | 2.851 | 760 | 830 |
| 28.06.95 | 4.386 | 1.193 | 1.314 |
| 05.07.95 | 3.263 | 894 | 981 |
| 12.07.95 | 3.212 | 885 | 972 |
| 09.08.95 | 3.736 | 967 | 1.013 |
| 16.08.95 | 3.505 | 917 | 930 |
| 23.08.95 | 4.044 | 1.073 | 1.102 |
| 30.08.95 | 759 | 198 | 204 |
| 06.09.95 | 1.361 | 352 | 350 |
| 13.09.95 | 2.591 | 672 | 665 |
| 15.09.95 | 1.816 | 475 | 483 |
| 20.09.95 | 3.779 | 1.005 | 1.071 |
| 27.09.95 | 3.772 | 1.013 | 1.120 |
| 29.09.95 | 137 | 37 | 41 |
| 04.10.95 | 2.639 | 844 | 788 |
| 11.10.95 | 2.282 | 677 | 673 |
| 18.10.95 | 3.794 | 1.407 | 1.149 |
| 25.10.95 | 1.571 | 423 | 465 |
| 27.10.95 | 369 | 99 | 109 |
| 02.11.95 | 2.020 | 542 | 604 |
| 08.11.95 | 1.289 | 344 | 382 |
| 10.11.95 | 1.060 | 283 | 315 |
| 16.11.95 | 1.552 | 413 | 447 |
| 22.11.95 | 3.570 | 1.315 | 1.073 |
| 24.11.95 | 1.202 | 444 | 365 |
| 29.11.95 | 3.366 | 1.251 | 1.102 |
| 07.12.95 | 642 | 172 | 206 |
| 08.12.95 | 222 | 59 | 71 |
| 20.12.95 | 1.510 | 398 | 415 |
| 21.12.95 | 3.006 | 804 | 863 |
| 28.12.95 | 3.717 | 1.358 | 1.102 |
| 31.12.95 | 3.992 | 1.491 | 1.671 |
| ÍALT 1995 | 135982 | 43639,1 | 43975,8 |
| Rættur skattur | | | 43975,8 |






# Frágreiðing um addaptivan útrokningarhátt av skatti.

*Samlað inntøka seinastu 3 mánaðirnar* verður roknað sum allar útgjaldingar í inniverandi mána pluss útgjaldingar i 3 undanfarnum heilum mánunum.

*Miðal dagløn seinastu 3 mánaðirnar* verður roknað sum *samlað inntøka seinastu 3 mánaðirnar* deilt við dagatali. Dagatalið er vanliga dagur nr í inniverandi mána + 90. Um skattskyldan byrjar í tíðarskeiðinum verður dagatalið at rokna frá tií degi skattskyldan byrjar. Um eingin løn er útgoldin í fyrsta mána av 3 mánaða tíðarskeiðinum verður dagatalið sett til dagur nummar í inniverandi mána + 60; Um heldur eingin løn er útgoldin í næsta mána av tíðarskeiðinum verður dagatalið dagur nummar í inniverandi mána + 30.

*Roknaða ársinntøkan eftir tí vanliga rokniháttinum* verður roknað sum *samlað inntøka higartil* deilt við *dagur nummar hesaferð* faldað við 366.

*Vektfaktorurin fyri miðal dagløn* verður roknaður sum: um *væntað miðal dagløn seinast* er til og at hon er útroknað innanfyri teir 3 seinastu mánaðirnar so (um *inntøka hesaferð* er størri enn (0,25 faldað við *roknaðari ársinntøku eftir tí vanliga rokniháttinum)* so *vektfaktor fyri smáar / vanligar útgjaldingar* annars *vektfaktor fyri stórar útgjaldingar)* annars 0,0.

*Vektfaktorur fyri smáar / vanligar útgjaldingar* verður roknaður sum 1 minus (0,7 faldað við *inntøku hesaferð* deilt við *(inntøku hesaferð pluss (roknaðari ársinntøku eftir tí vanliga rokniháttinum deilt við 52)))*.

*Vektfaktorur fyri stórar útgjaldingar* verður roknaður sum 1 minus 0,5 faldað við (1/3 faldað við *roknaðari ársinntøku eftir tí vanliga roknihættinum* minus *inntøku hesaferð* um hetta er størri enn 0 annars 0*)* deilt við (*(roknaðari ársinntøku eftir tí vanliga roknihættinum* minus *inntøku hesaferð)* deilt við 3*)*.

*Vektfaktorur fyri roknaða ársinntøku* verður roknaður sum : *um roknaða ársinntøkan seinast er til so :* ((Um inniverandi mani er desember so: (tað størra talið av 0,85 og *Vektfaktorur fyri smáar / vanligar útgjaldingar)* annars: (Um *inntøka hesaferð* er minni enn (0,01 faldað við *roknaðari ársinntøku eftir tí vanliga roknihættinum)* so *(Vektfaktorur fyri smáar / vanligar útgjaldingar)* annars ( *um dagfesting fyri uppgivna væntaða miðal dagløn rest av ári* er minni enn 90 dagar undan dags dato so 0,0 annars 0,2) ) )) annars 0,0.

*Uppgivin væntað miðal dagløn rest av ári* og *dagfesting fyri uppgivna væntaða miðal dagløn rest av ári* verða tøppaði inn í skattaskipanina til dømis um skattgjaldari boðar frá at hann er farin niður í hálva tíð.

*Væntað miðal dagløn hesaferð* verður roknað sum: (um *dagfesting fyri uppgivna væntaða miðal dagløn rest av ári* er minni enn 90 dagar undan dags dato so (*uppgivin væntað miðal dagløn rest av ári*) annars (*vektfaktorurin fyri miðal dagløn* faldað við *væntað miðal dagløn seinast* pluss *miðal dagløn seinastu 3 mánaðirnar* faldað við (1 minus *vektfaktorurin fyri miðal dagløn*))).

*Roknaða ársinntøkan hesaferð* verður roknað sum (1 minus *vektfaktorur fyri roknaða ársinntøku* ) ferðir (*samlað inntøka higartil* pluss *væntað miðal dagløn hesaferð* ferðir (365 minus *dagur nummar hesaferð* ) ) pluss *vektfaktorur fyri roknaða ársinntøku* ferðir *roknað ársinntøka seinast.* Um úrslitið av hesi útrokning gevur eitt minni tal enn *samlað inntøka higartil* verður *roknaða ársinntøkan hesaferð* set til *samlað inntøka higartil.*

*Roknaður ársskattur* verður roknaður á vanligan hátt útfrá *roknaðari ársinntøku.* (Um ein ynskir at leggja eina "jólagávu" í skattaútrokningina skal *roknaður ársskattur* hækkast við til dømis 1% tá útgjaldingin ikki er í desember.)

*Roknað meðalskattaprocent rest av ári* verður roknað sum *(roknaður ársskattur* minus *samlaður goldin skattur seinast)* deilt við *(roknað ársinntøka hesaferð - samlað inntøka seinast).*

*Goldin skattur hesaferð* verður so roknaður sum tað minna talið av *(0,57 og roknað meðalskattaprocent rest av ári* ) faldað við *inntøku hesaferð.*

*Tórshavn 1.11.1995*

*Eyjólfur Gislason.*

# Um broyting í samtíðarskattaskipanini.

## Inngangur

Her skal í stuttum greiðast frá einum nýggjum hátti at rokna skatt í samtíðarskattaskipanini. Ein almen frágreiðing um útrokning av skatti verður gjørd. Núverandi útrokningarháttur verður gjøgnumgingin og greitt verður frá hvussu nýggja útrokningin verður gjørd og hvussu hon kemur at virka undir ymiskum umstøðum. Ein meting verður gjørd um avleiðingarnar fyri restskatt og írestandi skatt og um avleiðingarnar fyri skattaumsitingina.

## Samandráttur.

Útrokningin verður gjørd á ein líknandi hátt sum í núverandi skattaskipan. Munurin millum tann nýggja háttin og tann gamla kann bítast í tveir partar. Annar er viðvíkjandi framrokning av inntøku fyri rest av ári. Hin er viðvíkjandi avrokning av ov nøgv/ov lítið goldnum skatti higartil, tá skipanin "uppdagar" at ársinntøkan verður størri ella minni enn væntað. Tann nýggja skipanin framroknar ársinntøkuna við einum roknihátti sum er grundaður á samlaða inntøku higartil pluss væntaða miðal dagløn rest av ári. Skatturin verður roknaður sum *inntøka hesaferð* faldað við *væntaðan skatt rest av ári* deilt við *væntaða inntøku rest av ári.*

Skattgjaldarin kemur at merkja broytingina á tann hátt at skattaprosentið verður nógv javnari enn við gomlu skipanini. Tann psykologiski marginalskatturin, tað er tann meirskattur ið verður tikin av eini meirútgjalding, verður munandi lægri enn við gomlu skipanini. Og tá árið er av verður samlaði skatturin líka rættur og í summum førum nógv rættari enn við núverandi skipan.

Skipanin vil um tað er møguligt ikki koma út við munandi restskatti, og í flestu førum verður avlopsskatturin lítil.

Umsiting av skipanini fer at vera lættari enn við núverandi skipan við tað at minni orsøk verður hjá skattgjaldaranum at spyrja skattaumsitingina um skattin av einstøkum útgjaldingum. Møguleiki verður hjá skattaumsitingini at grípa inn í útrokningina um skattgjaldari boðar frá munandi broyting í inntøkuviðurskiftunum.

## Alment um útrokning av skatti.

Skatturin verður útroknaður eftir mettari ársinntøku. Hetta er neyðugt tí at skattastigin er progressivur. Einasti veruliga ókendi er inntøkan restina av árinum. Onnur tøl ið verða brúkt í útrokningini so sum: inntøkan higartil í árinum, skattur goldin higartil, rentufrádráttur, inntøkufrádtáttir, útgjald hesaferð, kommunuskattaprosent, skattastigi, útgjaldingardagur, byrjunardagur fyri skattskyldu o.s.v eru kend. Útfrá hesum kendu tølunum skal gerast ein so góð meting sum møguligt av inntøkuni restina av árinum. Um framrokningin til ársinntøku kann gerast betri verður skattaútrokningin av sær sjálvum javnari.

*Einasti veruliga ókendi er inntøkan restina av árinum.*
*Tess betri framrokningin til ársinntøku kann gerast tess betri verður skattaútrokningin.*

Útfrá tí væntaðu ársinntøkuni og upplýsingum um rentufrádrátt o.s.v. verður væntaði ársskatturin útroknaður. Munurin millum goldnan skatt higartil og væntaða ársskattin gevur tann væntaða skattin restina av árinum. Spurningurin er so hvussu stóran part av tí væntaða skattinum restina av árinum skal takast inn av útgjaldinini hesaferð. Vert er at bíta merki í at munurin millum tann samlaða goldna skattin og tann samlaða gjaldkomna skattin kann bítast í vanligan skatt, og ov nógv/ ov lítið goldið higartil. Vanligur skattur svarar til miðal skattaprosentið faldað við útgjaldinum hesaferð. Ov nógv/ ov lítið goldið higartil svarar til tað sum eftir útrokningini er goldið ov lítið ella ov nógv higartil í árinum.

*Tann samlaði skatturin av eini útgjalding kann bítast í vanligan skatt og ein ov lítið/ov nógv goldnan skatt higartil.*

Eitt lítið taldømi: Um skattaútrokningin við eina útgjalding hækkar ella lækkar tað væntaðu ársinntøkuna við ávísari upphædd, til dømis 1000 kr, vil hetta ávirka tann væntaða ársskattin við marginalskattaprosentinum av upphæddini. Um marginalskatturin er 60 % vil hetta svara til ein eika ársskatt uppá 600 Kr. Um útgjaldingin er fallin mitt í árinum vil umleið helmingurin av hesum vera "fallin til gjaldingar" t.v.s 300 Kr. Spurningurin er nú hvat skal gerast við hesar 300 Kr. Ein møguleiki er at avrokna beinanvegin. Annar møguleiki er at avrokna ein part og so bíða við restini til seinni.

*Ov lítið/ov nógv goldin skattur higartil kann avroknast*

*við millum 0 og 100 %, restin bíðar til seinni.*

## Um núverandi útrokningarhátt.

Væntaða ársinntøkan verður roknað sum 366 faldað við samlaða inntøka higartil deilt við dagatali higartil. So verður árskatturin roknaður útfrá tí væntaðu ársinntøkuni. Tann skattur sum skal gjaldast hesaferð varð upprunaliga roknaður sum: (væntaður ársskattur deilt við 365 faldað við dagatali higartil) minus skattur goldin higartil avmarkað til millum 0 og skattahámarkið (í løtuni 57 %). Men av tí at hetta gav so ógvusliga ójavnt skattaprosent bleiv tann sokallaði "demparin" tikin í brúk. "Demparin" avmarkar frávikið í skattaprosentinum til í mesta lagi +/- 5 % frá miðalskattaprosentinum.

Framrokningin í núverandi skattaskipan ( 366 faldað við samlaða inntøka higartil deilt við dagatali higartil) hevur tann fyrimun at hon er einføld. Vansarnir eru at hon: er viðkvom fyri óregluligum útgjaldingardegi, er sera óviss fyrst í árinum, er sein at laga seg til varandi broytingar í inntøku, er ov viðkvom fyri smáum-, stórum- og skiftandi- útgjaldingum.

Útrokningin av skatti at gjalda hesaferð í núverandi skattaskipan avroknar ov lítið/ov nógv goldnan skatt við 100 % um hetta ber til innanfyri tær avmarkingar "demparin" setur. Vansin við hesum er at skattaprosentið verður ójavnt. Vansin við "demparanum" er at í summum førum er hann orsøk til at skattaprosentið ikki fær verið nóg lágt ella nóg høgt soleiðis at skattgjaldarin kemur út við óneyðuga stórum restskatti ella avlopsskatti. "Demparin" hevur onga ávirkan á tey frávik sum eru innanfyri +/-5 % frá miðalskattaprosentinum.

Tann psykologiski marginalskatturin er tann meirskattur ið verður tikin av eini meirútgjalding. T.v.s. um útgjaldið er 1000 hægri enn vanligt hjá einum fastløntum og skatturin er 900 kr hægri enn vanligt so er tann psykologiski marginalskatturin 90 %. Orsøkin er at ein meirinntøka verður framroknað til eina hægri ársinntøku sum síðan gevur ein hægri ársskatt og hægri miðalskattaprosent. Tað hækkaða miðalskattaprosentið verður so roknað við afturvirkandi kraft av allari inntøkuni higartil og avroknað 100 % av tí aktuella útgjaldinum. Við næstu útgjalding "uppdagar" núverandi skipan feilin og skattgjaldarin fær peningin aftur.

## Nýggjur útrokningarháttur.

Tann nýggi útrokningarhátturin ella tann addaptivi útrokningarhátturin (addaptivur = sjálvtillagandi) verður nevndur addaptivur tí at hann tillagar seg sjálvan eftir inntøkuviðurskiftunum hjá tí einstaka skattgjaldaranum. Hetta verður gjørt sjálvvirkandi uttan eftir eini rokniforskrift sum er eins fyri allar skattgjaldarar, so ikki neyðugt at bólka skattgjaldararnar í ávísar inntøkubólkar.

**Avrokning av ov nógv /ov lítið goldið higartil.**

Avrokningin av ov nógv /ov lítið goldið higartil verður fordeild javnt yvir tað væntaðu inntøkuna restina av árinum. Hetta er tað sama sum at skipanin setur skattaprosentið hesaferð soleiðis at skattaprosentið restina av árinum verður óbroytt um fortreytirnar ikki broytast. Hetta skattaprosent kann útroknast sum: *væntaður skattur rest av ári* deilt við *væntaðari inntøku rest av ári*. Skatturin verður so roknaður við at falda við *inntøku hesaferð*. Fyrimunurin við at rokna skattin á henda hátt er at tað er einfalt og at tað gevur eitt javnt skattaprosent. Vansin við at brúka hendan útrokningarháttin til at avrokna ov nógv /ov lítið goldið higartil er at hesin háttur ikki er góður um framrokningin av ársinntøku er sein at laga seg til varandi broyting í inntøku. So fortreytin fyri at hesin mátain at avrokna ov nógv/ov lítið goldið higartil er at framrokningin av ársinntøku er rímiliga skjótt at laga seg til varandi inntøkubroytingar. Um hetta ikki verður gjørt vil ein inntøka sum fellur fáa eitt søðugt fallandi skattaprosent inntil tað møguliga kemur niður á 0 og vil koma út við óneyðuga sórum avlopsskatti. Ein inntøka sum veksur varandi vil fáa eitt støðugt hækkandi skattaprosent til skattahámarkið verður nátt og møguliga koma út við óneyðuga stóraum írestandi skatti. Men saman við tí útrokningarhátti ið her verður uppskotin til framrokning av inntøku gevur hesin mátin at avrokna ov nógv /ov lítið goldið higartil sera javnt skattaprosent rímuliga rættan samlaðan skatt.

Um skattafrádrátturin ella inntøkufrádráttir verða broyttir mitt í ári kemur hetta at ávirka tann væntaða ársskattin . Tað væntaða skattaprosentið rest av ári verður sett til *væntaður skattur rest av ári* deilt við *væntað inntøka rest av ári*. Skattaprosentið vil sostatt beinavegin tilpassa seg tær broyttu fortreitirnar. Um alt annað er óbroytt verður skataprosentið óbroytt restina av árinum.

**Framrokning til ársinntøku.**

Góður háttur til framrokning av ársinntøku er avgerandi fyri eini góðari skattaskipan. Sum áður nevnt er einasta veruliga ókenda talið inntøkan restina av árinum. Og jú neyvari og stabilari framrokningin kann gerast tess javnari og neyvari verður skatturin. Í framrokningini verða brúktir sokallaðir vektfaktorar sum hava sum endamál at útjavna og mótvirka ávirkanum ið kundu fingið skattaprosentið at vera óstøðugari enn neyðugt er. Vektfaktorarnir eru eitt tal millum 0 og 1. Vektfaktorarnir verða brúktir til at útrokna eitt vigað miðal millum gamla og nýggja meting av árisinntøku, og væntaðari miðal dagløn rest av ári. Jú tættari vektfaktorurin er uppa 1 jú størri vekt verður løgd á tað gamla virðið ið verður goymt frá seinastu

skattaútrokning. Vektfaktorarnir verða roknaðir av nýggjum hvørjaferð skatturin verður roknaður. Lítlir vektfaktorar gera at skattaprosentið tillagar seg skjótari til broytiongar í inntøku, meðan stórir vektfaktorar geva javnari skattaprosent.

Framrokningin til ársinntøku verður gørd við at taka eitt vigað miðal millum a) *samlaðu inntøkuna higartil* pluss *dagatal rest av ári* faldað við *væntaðari miðal dagløn rest av ári* og b) *framroknað ársinntøka frá seinastu útrokning. Væntaða miðal dagløn rest av ári* verður roknað sum eitt vigað miðal millum a) *miðal dagløn seinastu 3 mánaðirnar* og b) *væntaða miðal dagløn rest av ári frá seinastu útrokning.*

## Nýggj skattaútrokning undir ymiskum umstøðum.

Fyri at lýsa framrokningina skal her greiðast frá hvussu framrokningin ávirkast av ymiskum serstøkum fyribrygdum so sum smáum útgjaldingum, stórum útgjaldingum o.s.v.

### Smáar útgjaldingar.

Um einstakar smáar útgjaldingar koma í millum fer væntaða ársinntøkan at vera umleið tað sama sum við síðstu útrokning. Hetta verður gjørt í framrokningini við at hava vektfaktorin fyri miðal dagløn og vektfaktorin fyri ársinntøku stóran tá útgjaldingin fer munandi niðurum tað sum svarar til eina vikuløn hjá skattgjaldaranum.

### Stórar útgjaldingar.

Um einstøk risastór útgalding ella tað íð svarar til umleið 1/3 av væntaðari ársinntøku kemur í gjøgnum, verður væntaða ársinntøkan hækkað við umleið støddini av útgjaldinum. Hetta er gjørt við at seta vektfaktorin fyri miðal dagløn høgt tá íð útgjaldið er stórt, soleiðis at ein einstøk stór útgjalding ikki kemur at ávirka væntaða miðal dagløn rest av ári so nógv. Avleiðingin av hesum er at ein so stór útgjalding fær skattaprosentið at springa uppá eitt hægri støði og verða nøkulunda óbroytt restina av árinum.

| DAGUR | INNTØK | NÚVERAN | ADAPTIV |
|---|---|---|---|
| Dato | 8 | DEMPARI | UTROKNING |
| 1994 | 105000 | | |
| 28.01.95 | 15858 | 7 369 | 7 279 |
| 25.02.95 | 531 | 168 | 242 |
| 26.02.95 | 15356 | 7 141 | 6 953 |
| 04.03.95 | 216 | 36 | 98 |
| 10.03.95 | 600 | 233 | 271 |
| 17.03.95 | 300 | 112 | 135 |
| 30.03.95 | 15355 | 6 999 | 6 906 |
| 27.04.95 | 18359 | 8 669 | 8 414 |
| 12.05.95 | 300 | 120 | 137 |
| 26.05.95 | 15646 | 7 225 | 7 234 |
| 29.06.95 | 300 | 115 | 138 |
